# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 8**<br>**Tíð:** 23. september 2013 kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Petry Joensen | |
| **Fastir fundardagar:**<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir | **Ikki á Fundi:** |

**1) Mál nr.: 13/00169**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram fyrra uppskot til Fíggjarætlan fyri Vágs kommunu 2014.
Uppskotið vísir ein rakstur uppá 29,9 mió. kr., rentur 2,4 mió. kr., inntøkur 36,7 mió. kr., avdráttur 4.9 mió. kr.. Uppskotið hevur eitt RLÚ uppá 5,1 mió. kr..
Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskotið á fundi 16. september og samtykt einmælt at leggja uppskotið fyri býráðið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**2) Mál nr.: 13/00213**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um samanlegging av matr. nr. 493a og 493b í Vági frá Michel í Lágabø.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00220**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um samanlegging av matr. nr. 565h og 462c í Vági. Vágs kommuna er eigari av hesum ognum og eri hetta stykkini barnagarðurin er bygdur á.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**4) Mál nr.: 13/00222**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um marknaumskipan frá Tórálvur Holm í Trøðini og Guðrun V. Joensen. Umsóknin inniber at matr. nr. 566g letur uml. 140 $m^2$ til matr. nr. 566h.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**5) Mál nr.: 13/00188**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til dagføringar av byggisamtyktini hjá Vágs kommunu. Tekniska nevnd og Havnanevndin hava viðgjørt broytingar í byggisamtyktini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum broytingum.

**6) Mál nr.: 13/00059**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan um eykajáttan, nú endaligt er gjørt upp hvat byggingin av nýggja barnagarðinum hevur kosta.
Fyri fíggjarárið 2013 er samlaði kostnaðurin 3,35 mió. kr. so enn vantar ein eykajáttan uppá 1.550.000,00 kr. í.
Fíggjarnevndin viðgjørdi hetta á fundi 16. september, og vil mæla býráðnum til at taka undir við eykajáttanini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við eykajáttanini, eykajáttanin verður tikin av innistandandi.

Undirskriva:

Býráðið heitur á Teknisku umsiting og bygginevndina um, at eftirkannað at alt er gjørt sum ætla, og geva býráðnum ein endaliga gjøgnumgongd av at húsið er endaliga liðugt.

**7) Mál nr.: 13/00223**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot um at stovna kommunufelag fyri allar kommunur.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**8) Mál nr.: 13/00217**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðv. byggingini av Torginum. Og teimum tvistum sum hava staðist av hesum máli.

| | |
|---|---|
| Tilfar í málinum: | Notat frá fundi 27. apríl 2010 |
| | Uppskot til semju dagf. 20. mai 2010 |
| | Samtykti juni 2010 |
| | Skriv dagf. 21. juli 2010 |
| | Niðurstøða hjá Kærunevndini 11 des. 2012 |

Arni Brattaberg hevur í telduposti dagfestur 4. september 2013, sent nýtt uppskot til semju. Hetta er soleiðis nýtt tilfar í málinum.

**Avgerð:**
Anna B. Samuelsen var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Býráðið staðfestur samtyktina frá 2010 um at gjalda Arna max. 200.000,00 kr. fyri ger av gongubreytini.
Býráðið ynskir at man í framtíðini kann gera sum ætla var, at binda hesa gongubreyt saman við gongubreytunum vestan og uttan fyri.
Býráðið er ikki sinnað at taka av tilboðnum frá Arna sent kommununi í telduposti 4. september 2013.
Eykajáttan verður givið til hetta av innistandandi.

Undirskriva:

**9) Mál nr.: 13/00139**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðv. bygging av bilhúsið hjá Hans Jákup Debess.
Tekniska nevnd hevði til viðgerðar á fundi 9. september, umsókn frá Hans Jákup Debess, um at hækka tekjuna á bilhúsinum samsvarandi tí, sum bygt er.
Tekniska nevnd samtykt, at leggja málið fyri býráðið við tilmæli um, at byggiloyvi frá umsøkjaranum heldur seg til byggiloyvi BL2010-08 frá 16.09.2010 og at tað ikki verður givið loyvi at hækkað bilhúsið sambært umsókn frá 24. apríl 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Undirskriva: